# Hvussu væl kennir tú Bíbliuna? svørini

## Gamla Testamenti

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Hvussu æt urtagarðurin, har Adam og Eva búði, til Gud rak tey út, tí tey vóru ólýðin og ótu frukt av kunnleikans træi? | Eden (Paradís) |
| 2 | Hvussu æt sonur Evu og Adam, sum drap bróður sín? | Kain |
| 3 | Gud bað Nóa byggja eitt stórt skip til fólk og dýr, sum Gud vildi skuldu liva, eftir hann hann hevði latið tað regna, líka til øll jørðin stóð undir í vatni? Hvussu kallast skipið? | Arkin (Ørkin) |
| 4 | Nóa hevði tríggjar synir við umborð á skipið, sum skuldi bjarga hansara fólki og flestu dýrum frá at týnast í vatnflóðini, Gud sendi av himli. Ein sonur æt Sem, ein annar Kam. Hvussu æt hin triðji? | Jafet |
| 5 | Vatnflóðin frá Gud, sum týndi næstan alt lív á jørðini, verður kallað syndaflóðin. Tá ið hon tók at minka, strandaði stóra skipið hjá Nóa á einum fjalli. Hvussu eitur tað fjallið? | Ararat |
| 6 | Eftir syndaflóðina setti Gud eitt tekin á luftina um, at jørðin ongantíð aftur skuldi ganga undir í vatni. Hvat er tað fyri tekin? | Ælabogin |
| 7 | Í Bíbliuni lesa vit, at meðan øll fólkini á jørðini tosaðu sama mál, ætlaðu tey at byggja eitt høgt torn, sum skuldi røkka til himmals. Tað vildi Gud ikki og blandaði málini. Hvussu æt tað tornið? | Bábilstornið |
| 8 | Ábraham var maðurin, sum óttaðist Gud meira enn aðrir. Gud bað hann fara úr heimlandið sínum til landið Kanáan. Har búsetti hann seg uttan fyri eina bygd, sum seinni er vaksin til ein stóran bý á Vestara áarbakka, sum tað nú eitur. Hvussu eitur býurin? | Hebron |
| 9 | Saman við Ábraham fór bróðursonur hansara Lot til landið Kanáan. Hann búsettist uttan fyri ein stað, sum Gud seinni læt svávul og eld regna niður yvir, tí fólkini har vóru so gudleys. Hvussu æt staðurin? | Sodoma |
| 10 | Ábraham og kona hansara Sára vóru bæði gomul, hann hundrað ár, tá ið hon at enda átti ein son. Hvussu æt hann? | Ísak |
| 11 | Ein son átti Ábraham við eini trælkvinnu, sum æt Hagar. Sára, kona Ábraham, vildi ikki vita av teimum báðum og bað mannin reka tey burtur. Hvussu æt tann sonurin? | Ísmael |
| 12 | Ábraham vildi hava, at sonur hansara við Sáru fekk sær konu úr landinum, har skyldfólk hansara búðu, og sendi ein húskall at finna hana. Hvussu æt gentan, sum húskallurin kom heimaftur við? | Rebekka |
| 13 | Sonur Ábraham og Sáru fekk tveir synir. Teir vóru tvíburðar. Annar æt Jákup. Hvussu æt hin? | Esau |
| 14 | Bróðir Jákup segði seg vilja drepa hann, tí hann hevði snýtt seg fyri sín fyrstarætt, og foreldrini bóðu tí Jákup rýma til móðurbróðurin, sum æt Laban. Hann átti tvær døtur. Hvussu æt hon, Jákup fekk tokka til, og sum hann mátti arbeiddi sjey ár fyri at fáa? | Rakul |
| 15 | Í einum dreymi sá Jákup ein stiga ganga frá jørðini til himmals. Uppi yvir stóð Gud og talaði við hann um landið, hann vildi geva honum. Jákup gav staðnum, har hann hevði havt dreymin, navnið Betel. Hvat merkir tað? | Guds hús |
| 16 | Eina dóttur átti Jákup. Hon æt Dina. Hvussu nógvar synir átti hann? | 12 |
| 17 | Fýra av synunum átti Jákup við fyrru konu síni, bara tveir við seinnu konuni: Benjamin, sum var yngstur, og tann næstyngsta, sum Jákup var betri við enn allar hinar synirnar. Hvussu æt hann? | Jósef |
| 18 | Tann sonin, sum Jákup var serliga góður við, seldu brøðurnir til nakrar keypmenn og lugu fyri pápanum, at hann var deyður. Hvussu eitur landið, hann kom til? | Egyptaland |
| 19 | Næstyngsti sonur Jákup gjørdist mætur maður í landinum, hagar brøður hansara seldu hann, og nógv av hansara ætt komu og búsettust har. Fleiri hundrað ár seinni leiddi Móses eftirkomarnar aftur til gamla landið. Á vegnum gingu teir á turrum gjøgnum eitt hav. Hvussu eitur havið? | Reyða Havið |
| 20 | Meðan Ísraelsmenn, sum eftirkomararnir hjá Jákupi kallast, vóru á veg heim úr langari útlegd, fingu teir tey tíggju boðini. Hvussu eitur fjallið, har Gud gav Mósesi boðini? | Sinai |
| 21 | Tíggju eru boðini, Ísraelsmenn fingu frá Gudi. Hvussu ljóðar tað fjórða? | Tú skal elska faðir tín og móður tína |
| 22 | Tað longu tíðina Ísraelsmenn vóru á heimferð úr útlegd, var ofta var lítið og einki at eta hjá teimum í oyðimørkini. Tá sendi Gud breyð av himli. Hvussu kallaðist tað? | Manna |
| 23 | Móses doyði, áðrenn hann kom til "lovaða landið", ið hann kortini slapp at síggja av fjallinum Nebo hinumegin eina kenda á. Hvussu eitur hon? | Jordan |
| 24 | Meðan Ísraelsmenn høvdu verið í útlegd, høvdu onnur fólkasløg búsett seg í Kanáan. Nú noyddust teir at taka "lovaða landið" aftur við makt. Hvussu eitur fyrsti býurin, teir vunnu á við at ganga runt um borgarmúrin og blása í lúðrar? | Jeriko |
| 25 | Ein sera sterkur Ísraelsmaður fekk sær eina konu, sum æt Dalila. Eftir at hon hevði lumpað hann at siga sær, at hárið gav honum styrkina, fekk hon ein mann at raka tað av. Hvussu æt sterki maðurin? | Samson |
| 26 | Ein kend kona í bíbliuni eitur Rut. Hon var langomma ein drong í Betlehem, sum gjørdist gitnasti kongur í Ísrael. Hvussu æt hann? | Dávid |
| 27 | Smádrongurin úr Betlehem, sum seinni gjørdist kongur Ísraelsmanna, drap einaferð ein risa við einum sleingibandi og steini, sum rakti risan í pannuna. Hvussu æt risin? | Goliat |
| 28 | Batseba æt ein sera vøkur gift kona, sum kongur Ísraelsmanna forelskaði eg í. Fyri at fáa hana til konu sendi hann mann hennara í kríggj, har harðast leikaði á. Hvussu æt tann maðurin? | Uria |
| 29 | Ísraelskongur og Batseba fingu ein son, sum gjørdist kongur eftir pápa sín. Mest kendur er hann fyri sín vísdóm og fyri templið, hann læt byggja í Jerusalem. Hvussu æt hann? | Sálomon |
| 30 | Í Gamla Testamenti eru nógvir profetar. Ein tann kendasti er Elia. Ein fátæk einkja, ið hann einaferð gisti hjá, fekk tað lyftið frá honum, at mjøl hennara í krukkuni skuldi ikki verða uppi og oljan í krússinum ikki tróta, til regn kom aftur. Hvussu æt staðið, har einkjan búði? | Zarepta |
| 31 | Á einum heilagum fjalli skuldi Elia profetur einaferð prógva, at Harrin og ikki avgudurin Báal var tann sanni Gud. Hvussu æt fjallið? | Karmel |
| 32 | Gud sendi ein av profetum sínum til Ninive at boða frá, at býurin fór at verða lagdur í oyði, tí fólkið var so gudleyst. Í staðin fyri at fara beinanvegin, rýmdi profeturin umborð eitt skip, har hann í ódnarveðri varð tveittur fyri borð. Hvussu æt profeturin? | Jónas |
| 33 | Fýra av profetunum við bókum í Gamla Testamenti verða kallaðir teir stóru profetarnir, tólv verða kallaðir teir smáu. Tann fyrsti av teimum stóru eitur Esajas. Hvussu eitur tann næsti? | Jeremias |
| 34 | Eftir at vísasti kongurin hjá Ísraelsmonnum var deyður, fór ríkið í tvey. Størri parturin kallaðist Júda ríki. Fólkini har vórðu seinni flutt burtur í annað land, har tey noyddust at støðast í 70 ár. Hvussu kallaðist tað landið? | Bábylon |
| 35 | Nebukadnezar æt kongurin, sum flutti fólkini í Júda ríki í útlegd í sínum ríki. Á eini veitslu, sonur hansara helt, skrivaði ein hond á veggin: Mene tekel ufarsin. Orðini merktu, at dagar hansara vórðu taldir, og at hann fór at missa ríkið. Hvør var kongurin, sum tók ríkið og lovaði jødum heimaftur? | Kyros |
| 36 | Ein av kendu profetunum var millum teirra, sum vóðu flutt í útlegd, eftir at Jerusalem var tikin og templið brent. Hann var einaferð tveittur í eitt løvuhelli, men løvurnar gjørdu honum einki. Hvussu æt hann? | Dánjal |
| 37 | Eftir 70 ár í útlegd fingu jødarnir loyvi frá einum nýggjum kongi at fara heimaftur, men verri enn so allir fóru. Ein, sum var eftir, æt Mordokai. Hann vildi ikki boyggja seg fyri boðum frá kongi, og hevði fosturdóttir hansara ikki verið, høvdu allir jødar í landinum verið týndir tá. Hvussu æt hon? | Ester |
| 38 | Ein ríkan og gudrøknan mann gav Gud illamanni loyvi at freista fyri harvið at royna hansara gudstrúgv og tol. Hvussu æt maðurin? | Job |

HESTPRENT · TEL. 314 555





## Nýggja Testamenti

| | | |
|---|---|---|
| 39 | Fýra elevangeliir eru í Nýggja Testamenti. Í hvørjum av teimum finna vit tekstin, sum vit kalla jólaevangellið? | Evangeliinum eftir Lukas |
| 40 | Í Nýggja Testamenti hoyra vit um prestin Sakarias, sum ein eingil vísti seg fyri og segði, at kona hansara skuldi eiga ein son og eisini, hvussu hann skuldi eita. Hvat var navnið? | Jóhannes |
| 41 | Eingilin, sum hevði boðað Sakariasi frá, at kona hansara Elisabeth skuldi fáa ein son, kom eisini til Mariu moy við boðum um, at hon skuldi eiga Jesus. Hvussu æt eingilin? | Gabriel |
| 42 | Hvussu æt keisarin, sum ráddi í stóra rómverska ríkinum, tá ið Jesus varð føddur? | Augustus |
| 43 | Hvussu æt kongurin í Jødalandi, tá ið Jesus varð føddur? | Heródes |
| 44 | Tá ið Jósef fekk boðini, at øll skuldi skrivast í manntal, fór hann við Mariu til Betlehem, ættarbygd sína. Hvør var ættfaðir hansara? | Dávid |
| 45 | Hvussu mangir vóru vísmenninir, sum komu úr Eysturlondum at tilbiðja Jesusbarnið? | 3 |
| 46 | Hvussu eitur bygdin, har Jesus vaks upp hjá Mariu og Jósef? | Nasaret |
| 47 | Hvussu gamal var Jesus fyrstu páskirnar, hann fór við Mariu og Jósef til Jerusalem, har tey mistu hann burtur, men funnu hann tríggjar dagar seinni í halgidóminum? | 12 ár |
| 48 | Jesus var 30 ára gamal, tá ið hann fór undir tað virki, Gud hevði sent hann til. Eitt tað fyrsta, hann gjørdi, var at lata seg doypa. Hvussu eitur áin, har tað hendi? | Jordan |
| 49 | Fyrstu lærusveinarnar, sum fylgdu Jesusi, itu Jóhannes og Andrias. So kom Andrias til hann við beiggja sínum Símuni. Honum gav Jesum eitt annað navn, sum merkir klettur. Hvat var navnið? | Pætur |
| 50 | Fyrsta undurverkið hjá Jesusi var at gera vatn til vín. Tað hendi í einum brúdleypi. Hvussu æt bygdin, har brúdleypið stóð? | Kana |
| 51 | Kapernaum æt ein bygd, har Jesus hevði tilhald og ofta prædikaði. Hon liggur við eitt vatn. Hvussu æt vatnið? | Genesaret |
| 52 | Vit hava bønina "Faðir vár" frá eini gitnari talu, Jesus einaferð helt. Hvussu kallast tann talan? | Fjallatalan |
| 53 | Tann maðurin, sum hevði doypt Jesus, fekk ein syndarligan enda. Hvør var unga gentan, sum móðirin á veitslu fyri konginum lokkaði at biðja um høvdið á doyparanum á einum fati? | Stjúkdóttir kongin, Saloma (Salomé) …er tó ikki nevnd við navni í Bíbliuni. |
| 54 | Í Jerusalem var ein serligur hylur, har sjúk fólk lógu og bíðaðu eftir at verða fyrst at sleppa niðurí og fáa heilsubót, hvørja ferð ein eingil órógvaði vatnið. Hvussu æt hylurin? | Betesda |
| 55 | Ein lógkønur spurdi Jesus, hvør var næsti hansara. Jesus svaraði við einum líknilsi sum ein mann, sum fall í ránsmannahendur. Hvør hjálpti tí manninum? | Hin miskunnsami sámariubúgvin |
| 56 | Í bygdini Betania búðu tvær systrar og ein beiggi, sum Jesus plagdi at vitja. Hvussu æt tann systirin, sum illskaðist inn á hina, ið setti seg at lýða á Jesus, meðan hon strevaðist? | Marta |
| 57 | Einaferð segði Jesus við teir skriftlærdu og hinar, sum komu við einari konu, teir høvdu tikið í at dríva hor: "Tann av tykkum, sum er uttan synd, kasti fyrsta stein á hana." Hvussu kallaðust hinir, sum vóru saman við teimum skriftlærdu? | Farisearar |
| 58 | Í einum líknilsi ger ein pápi veitslu fyri yngra soni sínum, sum kemur heim eftir at hava verið leingi burtur og skikkað sær illa. Eldri sonurin, sum hevur tænt pápanum trúliga øll árini, verður í øðini, men pápin biður hann gleðast um, at bróðurin, sum var deyður, var livnaður aftur. Hvussu kalla vit tað líknilsi? | Hin burturvilsti sonurin |
| 59 | Eitt líknilsi hjá Jesusi er um ein ríkan mann og ein fátækan. Meðan ríki maðurin dusar sær, ynskir tann fátæki einans at fáa molarnar, sum detta av borði hansara. Teir doyggja. Ríki maður endar í helheimi, tann fátæki í himlinum. Hvussu æt tann fátæki? | Lasarus |
| 60 | Í einum líknilsi gevur ein maður húskallum sínum pengar at húsast við, meðan hann er burtur í øðrum londum.Tveir eiga dupult so nógvar pengar, tá ið maðurin kemur aftur, meðan tann triðji hevur grivið sín penga niður, og hevur bara hann at vísa fram. Hvussu verða hesir pengar kallaðir í líknilsinum? | Talentir |
| 61 | Eitt sera kent vers í Nýggja Testamenti er: "Tí so elskaði Gud heinin, at hann gav son sín, hin einborna, til tess, at ein og hvør, sum trýr á hann, ikki skal glatast, men hava ævigt lív." Hvussu eitur evangeliið, har tað stendur? | Jóhs. 3,16 |
| 62 | Dagurin fyri páskir, tá ið Jesus reið inn í Jerusalem á einum asna, hevur eitt serligt navn. Hvat er tað? | Pálmasunnudagur |
| 63 | Hvussu æt urtagarðurin við Oljufjallið, har Jesus vakti og bað eina heila nátt, til menn komu við svørðum og kyndlum og tóku hann? | Getsemane |
| 64 | Á odda fyri monnunum, sum tóku Jesus í urtagarðinum við Oljufjallið, var ein av lærusveinum hansara. Hvussu æt hann? | Judas Iskariot |
| 65 | Hvussu æt rómverski  landshøvdingurin, sum var trekur at døma Jesus til deyða og vaskaði sær um hendurnar við hesum orðum: Eg eri ósekur í blóðinum á hesum rættvísa manni? | Pilatus |
| 66 | Jesus opinberaði seg fleiri ferðir fyri lærusveinum sínum, eftir at hann var risin upp frá deyðum, eitt sinn í fylgi við tveimum av lærusveinunum. Hvussu æt staðið, teir vóru á ferð til? | Emmaus |
| 67 | Í Apostlasøguni hoyra vit um fyrsta pínslaváttin, sum læt lív fyri Jesus Krist. Hvussu æt pínslavátturin? | Stefan |
| 68 | Ein tann ítarsti at forfylgja teimum fyrstu kristnu var Paulus, sum seinni gjørdist ein sannur kristniboðari. Hann varð umvendur á veg til ein bý at føra tey kristnu har bundin til Jerusalem. Hvussu eitur tann býrurin? | Damaskus |
| 69 | Paulus hevur skrivað trettan av brøvunum í Nýggja Testamenti. Í einum av brøvum hansara finna vit fleiri vers um kærleikan, sum er langmóðigur, illskast ikki, øvundar ikki, søkir ikki sítt egna, tolir alt og ber alt, og av teimum trimum trúgv, vón og kærleika er kærleikin størstur. Hvussu eitur brævið, har hetta um kærleikan stendur? | Fyrra Korintbræv |
| 70 | Hvussu eitur seinasta bókin í Bíbliuni? | Opinberingin |

HESTPRENT · TEL. 314 555